

# Tømrer heim til Silkeborg

Danski álopsspælarin Henrik Tømrer Pedersen, sum seinnu árini hevur spælt í enskum fótbólti, er á veg heim til Danmarkar. Hann fer at spæla fyri barndómsfelagið Silkeborg. - Eg rokni við at skifta til Silkeborg nú, men eg eri ikki leysur av mínum sáttmála við Hull enn, og eg havi ikki gjørt avtalu við Silkeborg enn, sigur Henrik Pedersen við sporten.dk Silkeborg spælir í næstbestu donsku fótbóltsdeildini, og Tømrer ætlar sær at verða við til at spæla felagið aftur í superliguna.

# Síla dreingirnir suverenir



*Gullmerkini floyma yvir Sílið, sum higar til hevur vunnið allar sínar róðrar*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Fyri fimtu ferð av fimm vóru tað dreingirnir hjá Havnar Róðrarfelag, sum vóru fyrstir á mál**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyrsta FM-heitið hjá Havnar Róðrarfelag gerst helst veruleiki, tá dreinjaróðurin verður í Miðvági. Tað tykist vera púrasta ivaleyst, eftir at Sílið aftur leygardagin svam fyrstur um málið.

Sílið hevði longu í startspurtinum hug at svimja undan hinum, hóast onkur hevði hug at hanga uppií – eitt nú Strálan av Strondum. Og síðani var tað bara ein spurningur, hvussu tryggur og sannførandi sigurin hjá Sílinum skuldi verða.

Havfrúgvin var aftur hesa ferð næstfremst. Eina løtu høvdu teir á Junkaranum hug at bjóða av, men so spentu teir á vestmannabátinum í aftur, og á málinum var eingin ivi. Sílið var eina bátslongd frammanfyri Havfrúnna, sum var meiri enn eina bátslongd frammanfyri Junkaran.

Um fjórða plássið var tøtt kapping millum Tjaldrið, Snípuna og Katlu.

# Drekastevnið er enn við

**Við sannførandi sigri í Vestmanna hevur Havnarbáturin rættiliga bjóðað Orminum av í FM kappingini millum 10-mannaførini**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



Tað er lagt upp til sera tætta kapping um FM heitið í kappingini millum 10-mannaførini. Havnarbáturin var fyrstur á mál á seinasta róðrinum á fjarðastevnuni, og so er lagt upp til spennandi kapping i í teimum báðum síðstu kappingunum – í Miðvági og á Ólavsøku.

Tað var ógvuliga stórur spenningur undan startinum í dýrdarveðrinum. Vestmenningur tjóvstartaði, og tí varð neyðugt við nýggjum starti.

Havnarbáturin leyp avstað, og síðani stýrdi hann kappingini, og á málinum var hann gott og væl leysur av Orminum, sum frammanundan hevði vunnið tríggjar av fýra róðrum.

Eysturoyingur og Vestmenningur vóru við fyri fyrstu ferð. Eysturoyingur bjóðaði av í startinum, men tað var skjótt, at guli báturin dragnaði, og so var talan um tvær kappingar: Havnarbáturin og Ormurin kappaðust um fremsta plássið. Í tí kappingini var munurin ein bátslongd og reiðiliga tað.

Í aftaru kappingini var Eysturoyingur fremstur.

| Úrslitini á fjarðastevnu | |
|---|---|
| **5 mannafør dreingir** | |
| 1 Sílið | 5:02:04 |
| 2 Havfrúgvin | 5:05:23 |
| 3 Junkarin | 5:10:00 |
| 4 Tjaldrið | 5:13:21 |
| 5 Snípan | 5:14:06 |
| 6 Katla | 5:14:20 |
| 7 Teistin | 5:17:13 |
| 8 Blikur | 5:21:06 |
| 9 Jallurin | 5:23:01 |
| **6 mannafør kvinnur** | |
| 1 Jarnbardur | 5:28:08 |
| 2 Fortuna | 5:31:16 |
| 3 Gongurólvur | 5:46:23 |
| 4 Lómur | 5:47:13 |
| **5 mannafør gentur** | |
| 1 Drekin | 5:21:22 |
| 2 Hvassi | 5:23:16 |
| 3 Junkarin | 5:24:24 |
| 4 Jallurin | 5:25:13 |
| 5 Firvaldur | 5:29:10 |
| 6 Tambar | 5:36:17 |
| 7 Blikur | 5:42:02 |
| **5 mannafør kvinnur** | |
| 1 Sílið | 5:16:10 |
| 2 Frúgvin | 5:18:02 |
| 3 Katla | 5:18:13 |
| 4 Báran | 5:23:01 |
| 5 Erla Kongsdóttir | 5:24:00 |
| 6 Ritan | 5:29:04 |
| 7 Teistin | 5:32:19 |
| 8 Blikur | 5:42:22 |
| **6 mannafør menn** | |
| 1 Riddarin | 4:50:13 |
| 2 Sundabáturin | 4:54:21 |
| 3 Tvørabáturin | 4:56:13 |
| 4 Hósvíkingur | 4:59:05 |
| 5 Rádni | 5:00:10 |
| 6 Gongurólvur | 5:01:11 |
| 7 Strálan | 5:01:16 |
| 8 Lómur | 5:02:10 |
| 9 Víkingur | 5:03:00 |
| 10 Fortuna | 5:05:05 |
| **8 mannafør** | |
| 1 Heiðabáturin | 4:34:02 |
| 2 Árnfirðingur | 4:36:00 |
| 3 Argjabáturin | 4:38:11 |
| 4 Kvívíkingur | 4:39:02 |
| **10 mannafør** | |
| 1 Havnarbáturin | 4:25:04 |
| 2 Ormurin | 4:29:24 |
| 3 Eysturoyingur | 4:41:14 |
| 4 Nólsoyingurin | 4:49:11 |
| 5 Vestmenningur | 4:56:01 |